# Partalagsyvirlýsing

Føroya

og

Sambandsríkisins Amerika

millum

um

økt samstarv

YVIRLÝSING UM PARTALAG MILLUM FØROYAR OG SAMBANDSRÍKIÐ AMERIKA UM ØKT SAMSTARV

**FØROYAR og SAMBANDSRÍKIÐ AMERIKA**, hereftir nevnd "partarnir";

**VIÐURKENNA** at hava felags strategisk og búskaparlig áhugamál í Norðuratlantshavi og í Arktis og eru tilvitandi um sterkt partalag, grundað á felags aðalreglur og virði, sum millum annað fevna um virðing fyri rættartrygd, mannarættindum og virðunum í fríum marknaði;

**HALDA SEG TIL** til aðalreglur um javnrættindi, gjøgnumskygni, álit og sínámillum virðing;

**ÁSANNA** at hava felags áhuga at fremja samstarv og styrkja sambandið millum USA og Føroyar fyri sínámillum búskaparligan, vísindaligan og mentanarligan ágóða;

**HAVA Í HUGA** ta makaleysu vísindaligu, tøkniligu, fyrisitingarligu og politisku serfrøðina hjá báðum pørtum, Føroyum og USA;

**ENDURVÁTTA** tann sosiala og búskaparliga ágóðan av ferðavinnu, burðardyggari nýtslu av tilfeinginum í havinum og ætlanirnar at halda fram við at menna varandi orku;

**ÁSANNA** viljan hjá báðum pørtum at víðka og margfalda handilin millum Føroyar og USA;

**ERU TÍ NÚ** komin ásamt um:

1. Henda partalagsyvirlýsing markar byrjanina til styrkt samstarv millum Føroyar og USA á økjum, sum hava okkara felags áhuga, sum fevna um, men ikki eru avmarkað til:
    - Økisviðurskifti, m.a. sjótilbúgving, umsiting av havtilfeingi, gransking og útbúgving og umhvørvisvernd;
    - Granskingarsamstarv, sum millum annað fevnir um orkupolitikk, varandi orku, sjó- og havgransking og heilsu;
    - Mentanarligt samstarv, sum millum annað fevnir um útbúgving og list; og
    - Búskaparligt samstarv, sum millum annað fevnir um burðardygga búskaparliga menning, ígongdseting, nýskipan, ferðavinnu og handil.

2. Partarnir hava í hyggju at fáa serfrøðina hjá báðum pørtum at virka saman og fáa í lag samstarv millum stjórnarráð, stovnar, akademiskar stovnar og umboð fyri privata geiran bæði í Føroyum og í USA.

3. Við felags avgerð og undir galdandi lógum og fyriskipanum kunnu partarnir bjóða øðrum at vera við í samstarvinum, sum verður innan fyri karmarnar um hesa partalagsyvirlýsing. Hesi kunnu vera stjórnarráð, myndugleikar og stovnar undir stjórnum partanna, universitet, vísinda- og granskingarstovnar, lærustovnar og aðrir stovnar, privatar fyritøkur og fyritøkur í samstarvslondum í

økinum. Luttøkukostnaður verður væntandi ábyrgdin hjá teimum, sum taka upp samstarv og undir galdandi lógum og fyriskipanum.

4. Henda partalagsyvirlýsing leggur ongar løgfrøðiliga bindingar á partarnar og er ikki ætlað at binda ella seta krøv um fígging hjá pørtunum báðum.

5. Hvør partur sær útnevnir eitt umboð at røkja hetta samstarv og tey átøk, ið hava til endamáls í verki at fremja hesa yvirlýsing. Um ikki annað verður avrátt, verða Føroyar umboðaðar av stjóranum fyri uttanríkistænastuna og USA umboðað av vara-undiruttanríkisráðharranum fyri evropisk og evrasisk mál við ábyrgd av norðurlendskum, baltiskum og arktiskum trygdarpolitiskum málum. Umboðini hava í hyggju at kalla saman til felags fundar eina ferð um árið at endurskoða gongdina. Og vísa á, sum avrátt millum báðar partar, annað virksemi, sum kundi fingið ágóða av samstarvi millum partarnar, eisini aðrar fundir á høgum stigi, sum hóskiligt kundi verið.

6. Henda partalagsyvirlýsing er ætlað at verða sett í verk, tá ið hon verður undirskrivað. Partur, ið vil taka seg burtur úr hesari yvirlýsing, eigur at lata hinum partinum skrivliga fráboðan í minsta lagi 90 dagar frammanundan. Slík afturtøka er ætlað at slíta samstarvið í hesi partalagsyvirlýsing. Slíkt slit er ikki ætlað at ávirka tað virksemi, sum er í gongd, og sett í verk undir yvirlýsingini framman undan slitinum.

Undirritað í Tórshavn tann______dagin í novembur, 2020.

| FYRI FØROYAR | FYRI SAMBANDSRÍKIÐ AMERIKA: |
|---|---|
| ___________________________ | ___________________________ |
| Jenis av Rana<br>Landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum | Michael J. Murphy<br>Vara-undiruttanríksráðharri<br>Deildin fyri evropisk og evrasisk mál<br>Amerikanska uttanríkisráðið |